# Daddan og Smyrjibreyðsbúðin






Charlotte Ellendersen, sum eigur og rekur handlarnar Smyrjibreyðsbúðina og Dadduna í Havn, hevur nú eisini latið upp Dadduna í Skopun.

Virksemið hjá Charlotte Ellendersen umfatar nú eisini Dadduna í Lonini í Skopun. Talan er um ein handil við klæðum til børn og ung frá 0 til 16 ár.

Báðir handlarnir, Daddan á Hálsi í Havn og í Lonin í Skopun, hava fingið og fáa nógva vøru heim jóla. Daddan selur kend merkir sum t.d. Minymo, Fransa, Fixoni, Grunt, NexLevel og Juice. Daddan leggur dent á at hava vørur í góðum kvaliteti til kappingarførar prísir og at veita sínum góða tænastu.

Umframt Dadduna eigur og rekur Charlotte Ellendersen eisini Smyrjibreyðsbúðina í Bøgøtu.

Smyrjibreyðsbúðin hevur altíð nýggjar og frískar vørur, sum eru framleiddar úr fyrsta floks rávøru. Alt verður tilgørt í Smyrjibreyðsbúðini sum t.d. at steikja fisk, roastbeff og fleskasteik, baka leverpostei, marinera høsnarungabringu og dampa av. Eisini verður ein stór mongd av eggum og pasta kókað til breyðini hvønn dag umframt at baka bollar og flutes. Handilin hevur eisini lættar heitar rættir við salat og nýbakaðum breyði.

# Jólahugni í Irish Pub

Í innbjóðandi og hugnaligum umhvørvi yvirav Smiðjuni í Lítluvík bjóðar Irish Pub Faroes fram bæði mat og drekka í írskum stíli.

Tær eru nær um allan heimin, hesi serligu, hugnaligu og sermerktu støðini har alt tekur støði í tí írska umhvørvinum.

Írska pubbin er á tremur við mentan og søgu. Í 1900 talinum blivu írsku pubbirnar bannaðar av ensku myndugleikunum, men írska lyndið gjørdi at pubbmentanin tók dyk á seg, og til okkara dagar hevur hendan menningin hildið fram við tí úrsliti, at írsku pubbirnar eru at finna í nærum øllum heiminum.

The Irish Pub Faroes er nú eisini karmur um hetta hugnaliga virksemi. Irish Pub er eitt gjøgnumført koncept, sum er gjørt í tøttum samstarvið við The Irish Pub Company, sum er heimahoyrandi í Dublin. Eitt gjøgnumført konsept úr enda í annan við góðari tænastu til




kundan. Saman við tí kenda írska úrvalinum av øli og whisky, er eisini ein løtt og litføgur matarskrá sett á breddan.

Umhvørvið er hugnaligt við t.d fótbólti á flatskermum við góðari ljóðgóðsku umframt livandi tónleiki hvørt vikuskifti við útlenskum og heimligum trubadurum.